*Tíðindaskriv frá Sjúkrasystrafelag Føroya*

## Norðurlendsk fakpolitisk sjúkrasystraráðstevna í Føroyum

Í døgunum 7. og 8. sept. verður SSN ráðstevna hildin í Føroyum. Limalondini í SSN (Sjúkrasystra Samstarv í Norðurlondum) eru: Danmark, Noreg, Svøríki, Finland, Ísland og Føroyar.

Sjúkrasystrafelag Føroya hevur verið virkin limur í SSN síðan 1. jan. 1998. Í SSN eru 2 stýrisfundir árliga, og ein fakpolitisk ráðstevna, har ymisk aktuel mál verða viðgjørd. Vertir fyri fundinum eru limalondini uppá skift. Júst hesa ráðstevnu hevur verið sæð fram til, bæði tí at hetta er fyrstu ferð at Sjúkrasystrafelag Føroya er vertur, og tí at SSN júst í ár hevur 80 ár á baki. Sjúkrasystrafelag Føroya hevur gjørt eitt drúgvt fyrireikingararbeiði til stevnuna, soleiðis at útlendsku luttakararnir, umframt at kenna seg vælkomnar, fáa eina góða og gevandi ráðstevnu.

Í lógunum hjá SSN, ið vóru viðtiknar í 1920, stendur, at endamálið er at SSN er ein samstarvsstovnur, har umboð fyri limafeløgini geva sítt íkast til at menna heilsutænastuna sum heild og serliga sjúkrarøktaryrkið í Norðurlondum. Fyri at styrkja hesa menning, skal SSN eisini taka upp samstarv við viðkomandi norðurlendsk, europeisk og alheims feløg.

Ávís felags evni verða umrødd til ráðstevnurnar, tað verið seg faklig, organisatorisk, lønar og setanarviðurskifti hjá limunum. Henda ráðstevnan hevur fingið heitið »Sykepleje i en teknologisk tidsalder« og eru tað fólk við serkunnleika innan hetta økið, ið verða fyrilestrarhaldarar.

Hotel Føroyar verður karmur um ráðstevnuna.

Í sambandi við at teir norðurlendsku formenninir eru í Føroyum, verður limafundur í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið 8. sept., har evnið verður: Hvørjar broytingar eru væntandi innan organisatiónspolitikk í 2100 øld. (5 - 10 - 15 ár).

## Bók um kirkjukunnleika

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út bókina „Kirkjukunnleiki - Arbeiðsbók", sum Elsa Birgittu Petersen hevur skrivað. Jóhan Kjeld, lærari, hevur teknað myndirnar í bókini.

Ætlanin er, at bókin skal vera stuðul í kristnifrálæruni í skúlanum, har lesiætlanin eisini fevnir um kirkjukunnleika, kirkjubygningar og kirkjusiðir.

Hentar orðafrágreiðingar eru aftast í bókini. Alt tilfarið hevur verið brúkt og roynt í undirvísing í fólkaskúlanum.

Hestprent hevur prentað „Kirkjukunnleiki - Arbeiðsbók", og hon telur 50 blaðsíður og kostar 45 krónur.

## Hákun Steingrímsson deildarstjóri í Sjóvátrygging

*Føroya Sjóvátrygging hevur sett nýggjan mann í starvið, sum varð leyst, tá Páll Kunoy fór til Trygd*

Sveinur Tróndarson

Hákun Steingrímsson er 36 ára gamal. Hann er útbúgvin løgfrøðingur.

Hann hevur starvast í landsumsitingini í fleiri ár, tey seinastu, sum deildarstjóri á samskiftisdeildini í Vinnumálastýrinum.

Starvið, sum deildarstjóri í Føroya Sjóvátrygging varð leyst fyri kortum, tí kappingarneytin hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, Trygd fór avstað við verandi deildarstjóra.

# Gott hálvár hjá Føroya Tele

Sveinur Tróndarson

Í tíðindaskrivi frá leiðsluni verður sagt, at fyritøkan hevði eitt avlop upp á 18 milliónir fyrra hálvár í ár, móti 16,9 milliónum sama tíðarskeið í fjør

Her er talan um ein vøkstur upp á seks prosent. Av teimum 18 mió krónunum eru 1,5 mió settar av til skatt og 1,7 mió. eru settar av til konsessiónsgjald og rakstur av fjarskiftiseftirlitinum.

Nettosølan fyri fyrra hálvár 2000 vaks við átta prosentum úr 106 milliónum upp í 114 milliónir. Vøksturin stavar serliga frá øktum virksemi innan fartelefoni og internetnýtslu, samstundis sum vørusølan er økt. Harafturímóti eru inntøkurnar av fastnettelefoni minkaðar orsakað av takstirnir eru lækkaðir.

Tað var tann 1. februar í ár, at Føroya Tele lækkaði takstirnar fyri vanligar telefonsamrøður. Áðrenn kostaði tað 70 oyru um minuttin at ringja um dagin og 35 oyru um náttina. Nú kostar tað 38 oyru um minuttin um dagin og 24 oyru um minuttin um kvøldið.

Takstlækkingin hevur sjálvsagt við sær færri inntøkur og tá fyrra hálvár var farið, vóru um fimm milliónir krónur minni komnar í kassan fyri vanliga telefoni. Fyrra hálvár hevur Føroya Tele goldið 13 milliónir í avdráttum av lánum.

Samanlagda lániskuldin hjá Føroya Tele er nú 127 milliónir móti 140 milliónum við ársbyrjan í ár. Men við stóra íløgutørvinum, sum er fyri framman í huga, so er tað alneyðugt fyri fyritøkuna at minka um skuldina. Andras Róin, stjóri, segði við Sosialin fyrr í hesum mánaðinum, at íløgur fyri umleið eina milliard liggja fyri framman, so tí ræður um, at fáa skuldina niður sum skjótast.

Eginpeningurin hjá Føroya Tele økist við umleið 15 milliónum og er nú 142 milliónir krónur.

Hálvársúrslitið og gongdin higartil hava við sær, at leiðslan fyri Føroya Tele væntar at ársúrslitið verður gott, skrivar stjórin í tíðindaskrivinum.

# Stórt ferðamannaskip á Havnini



Rúni Olsen

Spentir vóru vit tá ið vit sóu hetta skipið koma siglandi inneftir. Tá vit komu oman á kajina vóru vit noyddir at bíða ein hálvan tíma, av tí at tað vóru so ómetaliga nógv ferðafólk við, tey flestu amerkanskir pensionistar.

Umborð var ógvuliga vakurt. Har var nógv, sum hesi amerikansku luksusdyr kunnu taka seg til ímeðan tey sigla runt um Evropa.

Skipið er úr Rotterdam og er á Cruiseferð runt um Evropa. Í løtuni sigla teir nú runt um í Norðurevropa, og hava akkurát verið á Shetlands oyggjunum. Úr Føroyum gongur leiðin ímóti Íslandi, síðani fer skipið suðureftir.





# Uppgávan verður at fyrisita

*Tað er ikki so lætt í eini handavend at finna ein persón at stjórna sjónvarpinum. Útvarpið og sjónvarpið eru eins stovnar, og tí játtaði eg at taka við sum fyribilsstjóri, sigur Jógvan Jespersen*



Eirikur Lindenskov

– Arbeiðsdagurin hjá mær verður í øllum førum øðrvísi. Hann verður longri og arbeiðsvikan verður eisini longri.

Hetta sigur Jógvan Jespersen, sum eftir áheitan frá landsstýrismanninum í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, í gjár tók við sum fyribilsstjóri í Sjónvarpi Føroya samstundis sum hann framhaldandi eisini skal røkja starvið sum útvarpsstjóri.

– Men hetta verður bert í eitt avmarkað tíðarskeið, sigur Jógvan Jespersen, sum ímyndar sær, at hetta ikki verður longri enn restina av hesum árinum.

– Verður nýggjur stjóri settur fyrr, so ongantíð betur, sigur hann.

Jógvan Jespersen vísir annars á, at tað kanska ikki var so løgið, at landsstýrismaðurin heitti á útvarpsstjóran um at taka um endan, tí tað kann vera ringt í eini handavend at finna ein persón, sum beinanvegin kann seta seg inn í viðurskiftini.

– Stovnarnir báðir eru púra eins og virka eftir somu lógum. Tí er tað ikki tann stóri munurin at fyrsita útvarpið og sjónvarpið, sigur Jógvan Jespersen.

Spurdur um Jógvan Jespersen verður millum umsøkjararnar, tá starvið sum sjónvarpsstjóri verður leyst, svarar hann.

– Eg havi onga viðmerking til hatta. Mítt starv er í útvarpinum, og har ætli eg mær at verða verandi. Talan er bara um eitt fyribilsstarv.

Tað var mánakvøldið, at Jógvan Jespersen varð spurdur, um hann vildi taka við sum fyribilsstjóri í Sjónvarpi Føroya. Hann fekk eina nátt at umráða seg í, og gjáramorgun játtaði hann umbønini.

Jógvan Jespersen sigur, at hann ikki ráðførdi seg við starvsfelagarnar í útvarpinum, áðrenn hann tók avgerðina, men teir fingu tað at vita í somu løtu, sum avgerðin varð tikin, sigur hann.

Hóast hann situr í tveimum stjórastørvum, so fær hann kortini ikki tvær stjóralønir, sigur hann.

– Hatta er ein avtala millum meg og Mentamálastýrið. Sjálvandi havi eg sett nakrar treytir, men tvær lønir er tað ikki talan um, sigur Jógvan Jespersen.

Jógvan Jespersen er annars ikki heilt óroyndur í sjónvarpinum. Hann var tann fyrsti journalisturin, sum settur var í starv, eftir at Jógvan Asbjørn Skaale og Finnbogi Ísakson settu skjøtil á sjónvarpstíðindini í Føroyum. Jógvan Jespersen varð settur starv í Sjónvarpi Føroya 1. august í 1984 og var í starvi har, til hann tók við sum útvarpsstjóri í 1990. Fyri 1984 hevði hann starvast í útvarpinum síðani 1979, tá hann fekk prógv frá Journalistskúlanum í Århus.

Jógvan Jespersen leggur dent á, at hansara uppgáva verður mest av fyrisitingarligum slag.

– Eg fari ikki at seta nýggj ting í gongd í sjónvarpinum, ella at stinga aðra kós út í kortið. Tað haldi eg, at ein nýggjur stjóri skal gera, sigur Jógvan Jespersen.

# Hørð kapping um rávøruna

*Norska útflutningsráðið hevur gjørt eina kanning av marknaðinum fyri hvítan fisk*

Kanningin vísir at íslendingar seinastu tíðina hava tikið markna frá Norðmonnum í Portugal. Hetta kemst m.a. av at toskurin í Barentshavinum er smáur og tí ikki er egnaður til saltfisk. Smái toskurin er dýrur at framleiða og tí er tað tórført at fáa tað at bera til fyri frystiframleiðsluna av toski. Hetta hevur ført við sær ein øktan útflutning av feskum og frystum óvirkaðum toski til Kina, Polen og Suður-Korea uppá 25%. Serliga er tað tann smáttfallandi fiskurin, sum fer til hesi lond, sum vegna lágar lønarkostnaðir kunnu virka henda fisk og selja hann aftur til kappingarføran prís á m.a. ES marknaðinum, - næstan 100% av hesum fiski verður útflutt aftur til evropeiska marknaðin.

Hetta merkir, at norðmenn kappast á ES marknaðin við fiskavørur framleiddar í m.a. Kina virkaðar úr norskari rávøru.

Kanningin bendir eisini á, at príslegan á toski hevur rivið seg leysan frá øðrum hvítum fiski sum t.d. hake og alaska pollock. Ein tilsvarandi kanning í 1996 vísti, at toskaprísurin fylgdi prísinum á øðrum hvítum fiski, men soleiðis er ikki longur. Høvuðsorsøkin til hetta er, at tað er lítið til av toski á marknaðinum og at heims kvoturnar samanlagt eru minkaðar í ár og koma væntandi at minka enn meira komandi ár.

### Upsi

Tilgongdin av alaska pollock og øðrum fiskasløgum, sum vanliga kappast við tosk minkar. Hetta fer eftir øllum at døma at føra til eina øktan eftirspurning eftir upsa, og at eftirspurningurin eftir upsa í framtíðini fer at verða enn meira tengdur at útboðnum av alaska pollock, hoki, hake og upsa.

Ein nýggj brúkarakanning, sum Fiskeriforskning hevur gjørt í Frankaríkið vísir, at brúkarin fatar alaska pollock og upsa sum vørur sum fult út kunnu setast í staðin fyri hvørja aðra, og at brúkarin ikki skilur ímillum norskan, franskan upsa, alaska pollock og deep-skinnað upsaflak. Substittutiónin millum hesar vørurnar í hesum marknaðinum er fullkomin.

Ein onnur týdningarmikil niðurstøða í hesi kanningini er at gjaldviljin hjá brúkunum er hægri enn tann prísurin, sum upsi í løtuni verður seldur fyri. Brúkarin vil fegin gjalda 39 frankar/kg meðan upsin ofta verður seldur niður í 29,9 frankar /kg. Tað er eingin eyka gjaldsvilji fyri deep-skinnaðan upsa so tað er ivasamt um henda framleiðsla er lønandi til tann franska marknaðin.

Franski brúkarin er eisini til reiðar at gjalda tveir til tríggjar frankar/kg meira fyri franskan upsa og kemst hetta fyrst og fremst at tjóðarkensluni. Brúkarin sær ongan annan mun millum norskan og franskan upsa.

(Kelda: EFF 2000).

## Útnorðurráðið ársfund í Føroyum

16. ársfundurin hjá Útnorðurráðnum verður hildin í Føroyum í døgunum 4. til 8. september. Á fundinum luttaka 17 tingmenn úr teim trimum londunum í útnorði, Føroyum, Grønlandi og Íslandi. Harumframt luttaka sum gestir tingmenn úr Norðurnevnd Norðurlandsráðsins Pehr Löv, nevndarformaður, og Dan Reinert Petersen, nevndarlimur.

Serliga evnið á fundinum verður ídnaðarsamstarv í útnorði. Føroyski landsstýrismaðurin í ídnaðarmálum Bjarni Djurholm og skrivstovuleiðarin hjá NORA Kjartan Hoydal halda fyrilestur um fundarevnið.

Herumframt verður á fundinum kjak við Helenu Dam á Neystabø, landsstýrismann í almanna- og heilsumálum, og Jørgen Niclasen, landsstýrismann í fiskivinnumálum, um samstarv millum myndugleikarnar í útnorði.

Samstarvið í útnorði hevur havt framgongd á nógvum økjum seinastu tvey árini. Útnorðuráðið fer framvegis at virka fyri at fremja áhugamálini í útnorði, og í hesum sambandi fer ráðið á ársfundinum m.a. at viðgera rekommandatiónir til stjórn/landsstýrini í útnorði. Endamálið við rekommandatiónunum er at styrkja mentanarliga samstarvið landanna millum. Í ár hevur evnið hjá Útnorðurráðnum verið mentan í útnorði. Í hesum sambandi skipaði Útnorðurráðið fyri eini stórari mentannarráðstevnu í Suðurgrønlandi fyrr í summar, sum gav íblástur til tær rekommandatiónir, sum nú verða lagdar fram.

Formaður í Útnorðurráðnum er Jógvan Durhuus, løgtingsmaður, men á ársfundinum tekur Ole Lynge, formaður í grønlendska landstinginum, við sum formaður.

## Stuðul til íløgur

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit um Blákrosscaféina í Havn. Vit søgdu, at Tórshavnar kommuna í 1998 hevði latið 50.000 krónur í stuðli til raksturin av caféini. Stuðulin, sum Tórshavnar kommuna lat, var ikki rakstrarstuðul, men stuðul til íløgur. Síðani hevur Tórshavnar kommuna ikki latið caféini nakran stuðul.

**blðm.**